FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 1. oktober 2021
J. nr.: 21/18255
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-038/2020 frá Frimodt Rasmussen, løgtingsmaður Jóannis Joensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um vegin til Múla

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Eru ætlanir um at halda fram við arbeiðinum at gera ábøtur á vegin til Múla?

2. Um slíkar ætlanir eru, nær kann so roknast við, at næsta stigið í hesum arbeiðinum verður tikið?

3. Nær kann roknast við, at vegurin verður endaliga dagførdur?

Svar
Múlavegurin varð gjørdur í áttatiárunum. Vegurin sum er 7 km langur, er ein einbreytaður grúsvegur, og er onkur teinur asfalteraður. Vegurin er tó einasti landsvegur í dag, sum ikki er asfalteraður allur. Tað er lítil ferðsla á vegnum, og eingin býr fast í bygdini.

Løgtingi hevur bert í einum føri seinanstu mongu árini, játtan pening beinleiðis til Múlavegin. Í 2015 vóru 1,0 mió kr. játtaðar, sum var brúkt til at betra nøkur vegastrekki. Í ár eru 500 tús. kr. játtaðar, sum eru brúktar til ábøtur, bilverju og annað.

Í samferðsluætlanini fyri 2018- 2030 verður mælt til at gera vegaakslar fram við vegnum, at fleiri víkipláss verða gjørd, bilverja verður sett upp, og at allur vegateinurin verður asfalteraður. Hetta verður mett til at kosta 52 mió. kr. Nær vegurin verður endaliga dagførdur velst um játtan, og hvør loys verður hildin at verða hóskandi.

Tinganes, 1. oktobur 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum